ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

28. apríl 2021
Mál: 21/06715-3
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Poula Lervig

Svar uppá fyrispurning eftir Tingskipanini § 52 a **Nr. 52-128/2020**

Evni: Barnaverndin - umsorganaryvirtøkur

Spurningar:

1. Hvussu mong børn eru umsorganaryvirtikin árliga seinastu 10 árini býtt á við og uttan samtykki frá foreldrunum?
2. Hvussu mong børn eru umsorganaryvirtikin árliga seinastu 10 árini eftir umbøn ella áheitan frá myndugleikapersónum?
3. Hvussu mong børn eru umsorganaryvirtikin árliga seinastu 10 árini eftir áheitan frá øðrum enn teimum undir spurningi 2 nevndu.
4. Hvussu mong børn eru umsorganaryvirtikin árliga seinastu 10 árini beinleiðis av føðideildini?
5. Hvussu stórur partur av umsorganaryvirtiknum børnum verða sett í fosturheim hjá einum í familjuni?
6. Er landsstýrismaðurin nøgdur við, at bert 15 av umsorganaryvirtøkunum eru settar úr gildi seinastu 6 árini?
7. Er landsstýrismaðurin nøgdur við, at 1% av øllum børnum eru umsorganaryvirtikin?
8. Er landsstýrismaðurin nøgdur við, at bert ein brotpartur av kostnaðinum til skipanina er brúktur til fyribyrging?

Viðmerkingar:
Í Breddanum í KVF tann 25. mars í ár kom fram, at 1% ella eini 120 børn eru tikin frá foreldrum og systkjum sínum. Onnur hagtøl vísa, at bert 15 umsorganaryvirtøkur vórðu settar úr gildi aftur í eitt tíðarskeið uppá 6 ár.

Í orðinum barnavernd liggur endamálið við skipanini, tað at kunna veita verju og hjálp til trongstadda barnið. Meira og meira leggja tey serkønu um allan heim dent á, at grundleggjandi endamálið er at veita alla hugsandi fyribyrgjandi hjálp, so barnið kann verða verandi heima hjá sínum kæru, og at seinasta loysnin er at umsorganaryvirtaka barnið og seta tað heiman.

Í Føroyum kundu tølini bent á, at omanfyrinevnda hugsan ikki er ráðandi. Hetta sæst aftur í fíggjarligu hagtølunum hjá Barnaverndarstovuni fyri 2018. Hesi vísa m.a., at:

- Bert minsti parturin verður brúktur til fyribyrgjandi fyriskipanir, samanlagt fyri landið 16,8 mió., meðan fosturforeldraskipanin hevði ein samanlagdan kostnað uppá kr. 21,8 mió. og stovnsøkið kostaði kr. 9,4 mió.

- Í 2018 vórðu í miðal brúktar 20.497 kr. fyri hvørt barnaverndarmál til fyribyrgjandi fyriskipanir, meðan árliga vórðu brúktar kr. 317.351 kr. fyri hvørt barn, sum var sett til fosturs.

Góðar 20.000 kr. til fyribyrgjandi fyriskipanir røkka ikki langt hjá eini skipan, sum sigur seg seta allar fyribyrgjandi fyriskipanir í verk, áðrenn eitt barn verður umsorganaryvirtikið. Vert er at hugsa um, at tað eru kommunurnar, ið gjalda fyri fyribyrgjandi fyriskipanir, meðan landið ber kostnaðin fyri umsorganaryvirtøkurnar. Tølini kundu bent á, at talan ikki er um eina skipan, ið arbeiðir fyri at hjálpa og fyribyrgja.

Á Løgtingi, 22. apríl

Steffan Klein Poulsen og Bill Justinussen

Svar:
Viðmerkjast skal, at hagtøl finnast ikki fyri tíðarskeiðið áðrenn 2015, tá Føroya Kærustovnur bleiv skrivstova hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Til spurning 1
Hagtøl eru ikki fyri, hvussu nógvar umsorganaryvirtøkur eru framdar við samtykki og uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum-/unum og/ella barninum yvir 15 ár. Uttan mun til um samtykki er givið frá foreldramyndugleikanum/-unum, skulu treytirnar fyri umsorganaryvirtøku sambært § 19, stk. 1 og 2 verða loknar. Ein umsorganaryvirtøka skal javnan endurskoðast av Høvuðsbarnaverndarnevndini, sambært §§ 24 og 24a í barnaverndarlógini. Sjónarmiðið hjá foreldramyndugleikanum/unum kann eisini broytast frá fyrstu umsorganaryvirtøkuna til, tá umsorganaryvirtøkan skal endurskoðast.

Til spurning 2
Avgerð um umsorganaryvirtøku verður tikin av Høvuðsbarnaverndarnevndini. Høvuðsbarnaverndarnevndin viðger einans mál eftir tilmæli frá barnaverndartænastunum.

Í 2020 vórðu 13 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð. Av hesum 13 børnunum vórðu 9 børn sett í fosturfamilju, meðan 4 vórðu sett á stovn.
Í 6 førum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmælinum frá barnaverndartænastunum um umsorganaryvirtøku av børnum. 2 av hesum 6 børnunum blivu seinni í 2020 umsorganaryvirtikin.

Í 2019 vórðu 14 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð. Av teimum vórðu 10 børn sett í fosturfamilju, meðan 4 vórðu sett á stovn.
Í 3 málum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmæli um umsorganaryvirtøku av børnunum.

Í 2018 vórðu 9 børn umsorganaryvirtikin, og av teimum vórðu 3 børn sett í fosturfamilju, meðan 6 vórðu sett á stovn.

Í 7 málum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmæli um umsorganaryvirtøku av børnum.

Í 2017 vóru 17 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð, og av hesum vórðu 13 sett í fosturheim, meðan 4 vórðu sett á stovn.
Í 2 málum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmæli um umsorganaryvirtøku av børnum.

Í 2016 vóru 18 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð, og av hesum vórðu 12 sett í fosturheim, meðan 6 vórðu sett á stovn.
Í 2 málum avgjørdi Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki at taka undir við tilmæli um umsorganaryvirtøku av børnum.

Í 2015 vóru 9 børn umsorganaryvirtikin fyri fyrstu ferð.

Til spurning 3
Eins og víst á í svarinum til spurning 2, so verða avgerðir um umsorganaryvirtøku av børnum tiknar av Høvuðsbarnaverndarnevndini, ið einans viðger mál eftir tilmæli frá barnaverndartænastunum. Avgerð um umsorganaryvirtøku av einum barni kann sostatt ikki takast eftir áheitan frá øðrum enn barnaverndartænastunum.

Til spurning 4
Barnaverndarlógin heimilar ikki, at avgerð verður tikin um umsorganaryvirtøku, sambært § 19, áðrenn føðing. Um barnaverndartænastan metir, at barn má takast frá foreldrunum beint eftir føðing, ella meðan barnið enn er á føðideildini, kann barnaverndartænastan taka bráðfeingis avgerð, sambært § 17. Ein bráðfeingis avgerð um at taka eitt barn úr heiminum kann ikki standa við í meira enn 4 mánaðir, tvs. at barnaverndartænastan innan 4 mánaðir má leggja tilmæli um umsorganaryvirtøku fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina ella lata barnið heim til foreldrini. Ein bráðfeingis avgerð hjá barnaverndartænastuni skal skjótast til ber og innan 2 yrkadagar leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.

Í 2020 blivu 3 børn sett heiman innan eina viku eftir føðing. Høvuðsbarnaverndarnevndin góðkendi allar tríggjar avgerðir.
Í 2019 bleiv einki barn sett heiman innan eina viku eftir føðing.
Í 2018 bleiv einki barn sett heiman innan eina viku eftir føðing.
Í 2017 bleiv 1 barn sett heiman innan eina viku eftir føðing. Høvuðsbarnaverndarnevndin góðkendi avgerðina.
Í 2016 bleiv 1 barn sett heiman innan eina viku eftir føðing. Høvuðsbarnaverndarnevndin góðkendi avgerðina.
Hagtøl fyri 2015 eru ikki tøk hesum viðvíkjandi.

Til spurning 5
Ein av týðandi uppgávunum hjá Fosturforeldraskipanini er at røkja skránna við fosturforeldrum, tað vil siga millum annað at bera so í bandi, at skikkað fosturforeldur eru tøk, tá tørvur er á tí. Tá barn verður sett heiman, verður altíð fyrst roynt at finna fosturforeldur, sum antin eru næstringar ella úr netverkinum hjá barninum, tí gransking vísir, at hetta ofta er tað besta fyri barnið.

Seinastu árini eru alt fleiri næstringar ella fólk úr netverkinum hjá barninum sett sum fosturforeldur.

Støðan í fosturforeldraskránni í dag er tann, at 51 familjur hava ikki serligt tilknýti til familjuna ella netverkið hjá barninum, 24 fosturfamiljur eru næstringafosturfamiljur og 21 fosturfamiljur eru netverksfosturfamiljur.

Til spurning 6
Avgerðir um, hvørt ein umsorganaryvirtøka skal halda áfram ella setast úr gildi, verður tikin av eini óheftari høvuðsbarnaverndarnevnd, ið er mannað við fakfólki á økinum. Landsstýrismaðurin hevur álit á, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur tær avgerðir, ið eru neyðugar at taka.

Til spurning 7
Verður samanborið við onnur lond, so eru talið av avgerðum um umsorganaryvirtøku í Føroyum áleið tað sama. Ynskiligt hevði verið, at ikki var neyðugt við avgerðum um umsorganaryvirtøkur, men samstundis er neyðugt, at vit hava eina skipan, ið loftar teimum børnum, ið hava tørv á hjálp og umsorgan, ið ikki kann veitast í heiminum.

Til spurning 8
Í viðmerkingunum til spurningin verður víst á, at í 2018 vórðu brúktar 16,8 mió.kr. til fyribyrgjandi fyriskipanir, samanborið við góðar 31 mió.kr. til fosturforeldraskipanina og stovnsøkið. Tá talan er um fyribyrgjandi fyriskipanir, so spenna hesar sera vítt, og eru allar fyriskipanirnar ikki serliga kostnaðarmiklar. Talan er samstundis um sera nógv og sera ymisk barnaverndarmál, ið ikki øll krevja somu fíggjarligu orku, og tí ber ikki til at gera ta niðurstøðu, at ov lítið av peningi verður nýttur til fyribyrgjandi fyriskipanir. Eins og spyrjararnir eisini vísa á í viðmerkingunum, so eru tað kommunurnar, ið gjalda fyri fyribyrgjandi fyriskipanirnar, og sambært lóggávuni eisini valda á økinum, og landsstýriskvinnan hevur álit á, at kommunurnar veita børnunum ta hjálp og umsorgan, ið tey hava tørv á og rætt til sambært barnaverndarlógini.

Tórshavn, 28. apríl 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýriskvinna